# Ráðgeving og fyriskipan av sølu av ognarluti hjá landinum í P/F Tjaldur

*Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur fingið heimild í høvuðskontu 3.37.6.11 í fíggjarlógini 2022 at selja partabrøvini, sum landið eigur í P/F Tjaldur. Í hesum sambandi hevur Fíggjarmálaráðið tørv á ráðgeving og fyriskipan av søluni.*

**Uppgáva**

Fíggjarmálaráðið skal í sambandi við ognarlutin hjá landinum í P/F Tjaldur lýsa málið fyri at útvega eitt nøktandi grundarlag til at kunna gera av, hvør loysn er tann búskaparliga og fakliga mest skynsama í einari møguligari sølu av ognarlutinum í felagnum. At stuðla undir tílíkari lýsing bjóðar Fíggjarmálaráðið hesar uppgávur út:

1. Gera virðismeting av P/F Tjaldur og greiða frá fyritreytum, serligum viðurskiftum v.m.
2. Meta um møguleikar at selja ognarlutin, nær best er at selja, og kortleggja møguligar keyparar
3. Meta um eina minstu upphædd fyri søluprís
4. Gera sølutilfar, skipa útboð og tryggja eina væleydnaða sølutilgongd
5. Samskifta við møguligar keyparar, fyriskipa sølufundir o.tíl.
6. Fyriskipa samráðingar við møguligarar keyparar
7. Gera tilmæli um sølu, treytir o.a.
8. Fyrireika søluavtalu

**Stutt um P/F Tjaldur**

P/F Tjaldur er samtaksfelag, har virksemið í mestan mun fer fram í dótturfeløgum. Atknýttu fyritøkurnar eru Sp/f Kerið, Sp/f Skrínið, Sp/f Hjallur, Sp/f Undir Bryggjubakka, Sp/f Løkir, P/f John Dam & Co., P/f North Nest Capital, Sp/f Kolan og Tjaldur Holdco I AS (Oslo). Felagið eigur kapitalpartar í assosieraðu fyritøkunum Sp/f Vindrøkt og Sp/f Føroyska Nummarfelagið. Felagið ger eisini íløgur í onnur virðisbrøv og kapitalpartar.

Virksemið er á ymiskum vinnuøkjum og marknaðum og er innan sølu, tænastu og menning av útgerð til alivinnuna, fiskivinnuna, orku, KT veiting og íløgur annars.

Í roknskapinum 2021 var samlaða ognin hjá samtakinum 909,3 mió. kr. og eginognin 538 mió. kr., av hesum minnilutapartar 111,3 mió. kr. Nettosølan var 1.305,1 mió. kr. og úrslitið 194 mió. kr., av hesum 22,4 mió. kr. til minnilutaáhugamálini. P/F Tjaldur lat vinningsbýti uppá 25 mió. kr. og hevur latið 15-25 mió. kr. í vinningsbýti síðani 2015.

Landsstýrið eigur partabrøv fyri 2,8 mió. kr. nominelt, svarandi til 2,8% av partapeninginum.

**Tíðarkarmur og tilfar**

Ráðgevingararbeiðið skal byrja í juli 2022 og skal vera avgreitt skjótast gjørligt. Kravt verður tí, at veitarin hevur neyðugu orku til taks.

Tøkt tilfar eru ársfrásagnir og onnur almenn skjøl.

**Krøv og upplýsingar annars**

Fíggjarmálaráðið krevur, at ráðgevin í ella saman við tilboðnum gevur eina gjølliga lýsing av, hvussu ætlanin er at skipa arbeiðið. Tilfar, sum verður framleitt, skal vera á føroyskum. Kravt verður, at tíðarætlanir verða gjørdar fyri, nær og hvussu hvørji stig í tilgongdini skulu fremjast í verki.

Veitarin skal gera uppskot um, hvussu uppgávan kann býtast sundur í smærri partar, so at Fíggjarmálaráðið fær eitt yvirlit yvir, nær ymsu partarnir skulu vera lidnir. Tað skal eisini nýtast sum gjaldsætlan.

Tilboð skulu latast sum fastur prísur uttan mvg. Um møgulig útlegg koma afturat upphæddini, skal tilskilast, hvørji útlegg talan kann vera um og væntaðu upphæddirnar.

**Minstukrøv til veitarar, ið vilja geva tilboð**

Talan er um sera týdningarmikið arbeiði, og tí setir Fíggjarmálaráðið faklig krøv til veitarar, sum vilja geva tilboð. Minstukrøvini til veitarar eru, at teir hava:

- Førleikar og royndir í at virðismeta fyritøkur, undir hesum roknskaparligar førleikar
- Førleikar og royndir í at fyriskipa sølu av fyritøkum ella líknandi førleikar og royndir
- Førleika og royndir at veita løgfrøðiliga ráðgeving og løgfrøðiliga tænastu í sambandi við søluna

Veitarar kunnu eisini tryggja, at partur av uppgávuni verður veittur av samstarvsfeløgum.

Veitarar, ið lata inn tilboð, skulu lata Fíggjarmálaráðnum yvirlit yvir teir persónar, sum ráðgevin ætlar at knýta at uppgávuni, og skjøl og tilvísingar, ið prógva, at teir lúka nevndu krøv.

Lýkur veitarin ikki minstukrøvini, verður tilboðið ikki viðgjørt.

**Vekt og val av tilboðsgeva**

Niðurstøðan um, hvørjum tilboði, ið tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum nevnd eru í hesum skrivi. Fíggjarmálaráðið skilar sær rætt til ikki at velja nakað av innkomnu tilboðunum, t.d. um mett verður, at einki teirra lýkur krøvini.

Tilboðini verða vektað soleiðis:

| Krav | Vekt | Partar av metingini |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | 65% | |
| Tilgongd, førleiki o.a. | 35% | • Lýsing av sølutilgongdini<br>• Lýsing av arbeiðsskipan og amboðum<br>• Tíðarætlan og meting av starvsfólkaorku<br>• Royndir við sølu av fyritøkum o.tíl.<br>• Tryggleiki |

Hvør partur av metingini verður givin stig millum 1 og 5. Partarnir verða síðani taldir saman fyri at fáa eitt met fyri ”tilgongd, førleiki o.a.”.

**Tíðarfreistir og ábyrgd**

Freistir í sambandi við uppgávuna eru sambært talvuni.

Ábyrgdarpersónur er Eli Christiansen, tlf. +298 226200 og teldupostur eli@fmr.fo.

| Dagur | Hending | Viðmerking |
|---|---|---|
| 8. juni | Útboð | Útbjóðingin verður kunngjørd á Keypsportalinum |
| 9. til 16. juni | Spurningar og svar | Spurningar skulu vera skrivligir og skulu sendast til fmr@fmr.fo.  Viðmerk: "Tjaldur spurningar". |
| 20. juni | Spurningar eru í seinasta lagi svaraðir | Spurningar og svar verða kunngjørd á Keypsportalinum. |
| 30. juni | Tilboð skulu vera inni | Freistin at lata tilboð inn er 30. juni kl. 16.  Tilboð, ið verða móttikin eftir freistina, verða ikki viðgjørd.  Tilboð skulu sendast til fmr@fmr.fo. Viðmerk: "Tjaldur tilboð". |
| 4. til 7. juli | Tilboð verða viðgjørd | Fíggjarmálaráðið skilar sær rætt til at biða tilboðsgeva um fund, áðrenn støða verður tikin. |
| 8. juli | Veitari verður valdur | Tilboðsgevarnir fáa boð. |